FIRMAKAPPING!!!

Skála Ítróttarfelag vil hervið boða frá at firmakapping verður í høllini á Skála tann 24. november.

- Spælt verður við hondbóltsmálum. Málmaðurin hevur ikki loyvi at brúka hendurnar
- Fýra leikarar eru á vøllinum, ein framman fyri miðjuna. Loyvt er at hava tveir útskiftarar
- Tað er bert loyvt at hava ein leikara, ið hevur leikt við 1. deild síðsta kappingarár, á liðnum. Eisini er loyvt at hava ein leikara, ið hevur leikt við 2. deild ella unglingum síðsta kappingarár. Lið, ið ikki halda hesa reglu, sleppa ikki at luttaka.

Seinasta freist at tekna seg til luttøku er mikudagin 21. november. Luttøkugjald er 400,- kr. Øll virkir eru vælkomin at luttaka.

Um tit ynskja at luttaka ella kanska onkrir spurningar eru, kunnu tit ringja á tlf. **227397/447670** ella **223804/449804.**

Skála Ítróttarfelag

Avloysarastarv

Toll- og Skattstova Føroya

Søkt verður eftir avloysara til kassan á Tollbúðini vegna barnsburðarfarloyvi.

Arbeiðsuppgávur
Vanligt kassaarbeiði, inn- og útgjøld umframt annað arbeiði í sambandi við kassan.

Førleikakrøv
Umsøkjarar við kunnleika til kassa/avgreiðsluarbeiði hava fyrimun. Viðkomandi verður harumframt upplærd/ur á staðnum.

Avloysaratíðarskeið
Frá umleið 10. desember 2001 til 1. august 2002 møguliga longri.

Setanartreytir
Løn- og setanarviðurskiftir eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, og lønin sambært 3. lønarflokki í sama sáttmála.

Spurningar hesum viðvíkjandi kunnu setast Kjartan Dam Joensen, yvirtollara, á tlf. 31 02 60, lok. 163.

Umsóknir
Umsóknir við avriti av prógvum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

26. november 2001

Toll- og Skattstova Føroya, Streymoyar øki
Postsmoga 3139
110 Tórshavn

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks øksskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja rakstur.

Núverandi setanarøki er Streymoyar øki, men fevnir annars um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir teirra, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Heimasíða
www.tollskatt.fo

E-mail
streymoy@tollskatt.fo

Toll- og Skattstova Føroya

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks øksskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja rakstur.

Á Sandoyar Øki, har viðkomandi kemur at starvast, eru 2 starvsfólk.
Sandoyar Øki tekur sær av dagligum avgreiðslum.

Lýsingin finst eisini á heimasíðu okkara
www.tollskatt.fo

E-mail
tollskatt@tollskatt.fo

Toll- og Skattstova Føroya

Starv sum málsviðgeri

Søkt verður eftir málsviðgera til Sandoyar Øki. Vegna ov fáar umsøknir, tá ið hetta starv varð lýst leyst seinast, verður starvið lýst leyst av nýggjum.

Hjøvuðsuppgávur
Álitsmingar- og eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald og toll, skatt og innkrevjing o.a., herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum. Arbeiðið er rættuliga sjálvstøðugt, tá tann, ið settur verður, skal kunna taka sjálvstøðugar avgerðir. Í ivamálum hevur hann beinleiðis tilvísing til deildirnar í Stýrinum.

Før leikakrøv
Tann, sum settur verður, skal hava roknskaparligan førleika. Umsøkjarar við roknskaparligari útbúgving hava fyrimun. Viðkomandi, ið settur verður, skal hava vilja til at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og Skattstovan bjóðar bæði á stovninum og uttan fyri stovnin eitt nú á handilsskúla v.m. og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar. Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt. Eisini er ynskiligt, men tó ongin treyt, at viðkomandi býr í Sandoynni.

Vit kunna bjóða
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v.øk.o. eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

Setanartreytir
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Núverandi setanarøkið er Sandoyar Øki, men fevnir annars um Fíggjarmálastýrið og stovnar undirtí, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri upplýsingar kunnu setast Randi Røsvik, roknskaparleiðara, á tlf. 35 26 00.

Umsóknir
Umsóknir við avriti av prógvum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

30. november 2001

Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið
Postsmoga 2151
FO-165 Argir

Niðan fyristandandi vinnarar eru drignir millum seld atgongumerki á Marko 01 sølustevnuni í Runavík

Seld atgongumerki fríggjadagin & leygardagin:

1. Flísan - gávukort	ljósareyður seðil	nr. 316
2. Reveal Internat. - varmarir	ljósareyður seðil	nr. 312
3. Frú S. - gávukort	ljósareyður seðil	nr. 248

Sunnudagin drigið millum øll seld atgongumerki:

1. Tutl - 3 føroyskar fløgur	ljósareyður seðil	nr. 399
2. Profa - gávukort	gráður seðil	nr. 416
3. Fótprýði - gávukort	gráður seðil	nr. 314
4. Thomas Dam Búnýti - stakið	gráður seðil	nr. 378
5. Hógv - ketil til oljufýr	gulur seðil	nr. 178

Vinnarar verða bidnir um at ringja 447838 ella 222251

Marko '01 Sølustevnan

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

TILTØK

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

Føroyingarfelagið í Aalborg
Lille Kongens Gade 10 B.
Tel. 98136330
E-mail:
ffaalborg@mail.tele.dk
Álaborg er opin soleiðis:
Fríggjadag: Fimmarin frá 17.00 til 19.00
Leygardag: Opið hús frá 22.00 til 03.00.
Álakórið venur hvønn sunnudag kl. 18.00.
Kortkvøld er annaðhvørt fríggjakvøld frá kl. 19.00
Føroyskur dansur er annaðhvørt hóskvøld kl. 19.30.
Annars vera tiltøk, ið verða á skránni, lýst í Túnatosi, sum kemur út einaferð um mánaðin.

Vika 46 – 14. november
Vinnaratøl: **12 - 16 - 17 - 24 - 26 - 35**

Eykatøl: **29 - 37**

6 vinnaratøl:	**Eingin vinnari**
5 vinnarat.+ eykatal	**43.997,- kr.**
5 vinnaratøl:	**3.771,- kr.**
4 vinnaratøl:	**121,- kr.**
3 vinnaratøl:	**40,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

Føroyingafelagið í Århus
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Teldupostur:
aaarstova@hotmail.com
Café'in er opin mánadag til hósdag kl. 16-18 og leygarkvøldsbarr kl. 22-03.
Føroysku bløðini liggja frammi. Kaffi er ókeypis.
Bøkur kunnu lánast á bókasavninum, meðan café'in er opin.
Innandura fótbóltur í Hasselager høllini fríggjakvøld kl. 21-23.
Flogbóltur í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16-18.
Badminton í Frydenlundskúlanum sunnudag kl. 16-18.
MFS kontórið er opin hvønn mikudag kl. 16-18.
Sunnudagsskúlin annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30.
Føroyskur barnaskúli annanhvønn leygardag (ólíka vikur) frá kl. 11-14.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Føroyingafelagið í Svoríki
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á
tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á
tlf. +468853570.

Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

Føroyingar í Noregi
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

VALUTAKURSIR

		14.11.01	Ultimo oktober
USA	**Dollarar**	846,6600	822,6900
Bretland	**Pund**	1217,5800	1197,3800
Týskland	**Markur**	380,6800	380,6700
Svoríki	**Króna**	79,9400	77,7000
Noreg	**Króna**	94,9600	93,1000
Frakland	**Frankur**	113,5100	113,5000
Belgia	**Frankur**	18,4570	18,4560
Sveits	**Frankur**	506,2900	506,6200
Holland	**Gyllin**	337,8600	337,8500
Italia	**Liri**	0,3845	0,3845
Finnland	**Markur**	125,2200	125,2200
Ísland	**Króna**	7,8800	7,9300
Eysturríki	**Skillingur**	54,1090	54,1070
Spania	**Pesetas**	4,4750	4,4750
Portugal	**Escudos**	3,7140	3,7140
Kanada	**Dollari**	532,6200	519,5200
Grikkaland	**Drakmur**	2,1850	2,1850
Japan	**Yen**	6,9441	6,7562
Írland	**Pund**	945,3800	945,3600
	Evra	744,5500	744,5300

FØROYA SPARIKASSI

KROSSORÐ

281

KAPITALISTAR 1	SVEIMARI	ÓSKIL	"LJÓS"	HAVNARMAÐUR	FRONSKA	HÁLJÓÐ	MAÐUR	ENSKLIGA	EIND	KALIUM	RAÐ	METUR	SKJÚVFELAG	MÚKKEL	NORGE	SAMAL OG HELENA
METAL				2						ESBJERG MAÐUR		ELLIVU ITALIA			KÓSIR	
GR. GYGGJ						GALLARI		3						KATRIN OG JONA		
SÝSSLUMERKI			HANS NIELSEN STÓLUR			SVANERKE MUSS OG —?			51 500			OLE JENSEN			DVINA	
ABERDEEN		SEIN TVEY				4	TEKNARI	MAÐUR AÐG				NATRIUM KLUBBI			ROMARTØL	
"HARRI"				EDD	REGLA SEKS				ALFA EISENHOVER	5	FERAMP STYRKJA		EINS			
HEINI OG SIGNAR															SVORIKI	
URAN		KÓS BÝUR NERIÐAT		GRØNJ. ORÐ DANT					6	KONA GUÐUR					TONS	
EYSTUR Á					TINGLIMUR EIND			KONA PASSA			7		EDD TUSKAÐI		SEINNA Í	
	NORGE LÍNUR		999 SETT			LÍVIR DREGUR Á SJÓGV	8		ÍDRA GUÐUR						RØNNE NATRIUM	
GRØNAR SKOGIR										ALFA SJÓKA		HENN				
JØVN					STUBUL NAKNU					9	INDIANARI MAÐUR					
FA. KVINNA									MAÐUR GVANLIG						FLUOR	
KONA				BRENNUR HÁLJÓÐ		10				KIVESARI REX			NITROGEN KILOTONS		TVÍJÓÐ KANN	
URAN		EINS	SCARA —? KALIUM					BISPUR ALFA			11	VARÐI TVÍJÓÐ				
ELLISHERKINI										REAUMUR	BÓK			12		

Vinnari:

Ann-Elisabeth Joensen
Varðabú 34
100 Tórshavn

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: JARNSEYMUR

J	A	M	E	S	-	C	O	N	N	O	L	L	Y	M
A	L	D	I	S		O	P	N	I		I	A	N	N	I
280	D		R		S	L			G	I	F		N	I	K
J	A	M	E	S	J	O	Y	C	E		F	R	I	D	A
O	N	O		A		M	D		L		E	U		A	L
N		R	E	K	A	B	U	L		A	Y	R		R	A
A	K	A		S	H	A	N	N	O	N		I	D	O	
T	A		K	U	R			V	I	T		I	S	I	
H	L		E	N		L		M	A	R	R		C		N
A	T	O	L		Y	O		A	R		E	V	U		I
N			T	I	P	P	E	R	A	R	Y		I	H	S
L	S	W	I	F	T		A	T		E	G	I	L		H
L	I	A	S		I	B		I	N	G	U			K	M
A			K	K		Ø	R	N		I	R	A	N		A
M	I	G		G	A	U			A	N			A	N	N
B	E	R	N	H	A	R	D	S	H	A	W		A	R	

Hvønn fríggjadag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn - og viðmerkið »Krossorðagáta nr. «281» á bjálvan.

281

Loysunarorðið: _____
Navn: _____
Bústaður: _____
Bygd/býur: _____

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ❑ **Mállæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt